

sæddar ganga aftur í Operahúsinum í Sydney, aldarinnar bygningur í 20. øld. Og Jørn Utzon (1918-2008) fór (ja, tíbetur) á Københavns Kunstakademi at lesa (1937-42).

Í føðingardagsveitslu í 1940 hittust Jørn og Lis (hon fylti 21 ár) fyrstu ferð, tey blivu góð og giftust í 1942 og fingu 3 børn: Jan f. 1944, Lin f. 1946 (kend fyri tekstil og postalín – bláu flísarnar í Kastrup Lufthavn) og Kim f.1957. Øll eru góðir arkitektar (eisini Jeppe, sonur Jan).

Árini komu, og eftir eitt hendingarríkt lív við møðsamum mótburði og miklum heiðuri valdu tey at búseta seg á Mallorca. Og har bygdi Jørn teimum eini hús ovalaga í líðini við útsýni, nevnd Can Feliz, og eitt hús við strondina nevnt, Can Lis. Lis og Ingálvur høvdu av og á brævaskifti fyri lívið.

### Bizzie Høyer

Tað undrar eisini, at Michael Wivel sigur, at Bizzie Høyer (1888-1971) er púra gloymd sum listafólk í Danmark nú á døgum. Tí hon má tó hava havt talent fram um onnur, sum enn eru kend. Men kanska hevur hon ikki havt nakran góða, sum hevur kunnað hjúklað um minni hennara; men hinvegin er tað tó ein uggi, at hon her á landi hevur havt næmingar og vinir, sum skara framúr: Ruth, Ingálvur, Hans og Terji. Og í Danmark m.o.: Copra-málaran Ejler Bille.

Til Ingálv í 1968 – eftir eina vitjan hjá henni av Elsu og Ingálvi, og sum hon fagnaði tey bæði fyri – skrivar hon móti lívsloki sínum:

»Lige meget hvor stor Forskel der kan være paa de Maal, man sætter sig som Kunstner, er der dog Ting, man kan blive helt enige om, – først og fremmest, at der maa staa en Overbevisning bag ens Arbejde, og at dette er Tilfælde for Dem, det lyser ud af Deres Arbejder.«

Hetta riddaraslagið fekk hann frá sínum gamla lærara. Og at hetta hevur merkt og glett hann, er eyðsæð.

### Úr Ingutrøð

Jens av Reyni (1878-1948) var ágrýtin framburðsmaður, og eitt vet av treiskni hongur uppi í fólkferðini. Mamman, Christina, var friðarlig, mild og fólkaliga fínlig dama. Tey fingu tríggjar synir. Tann elsti Jens Pauli var vinnulívsmaður: skip og Fiskacentralurin og var ein framúr skemtari við stíli) og Sigird, ágrýtin og støðufastur: elektrikari og bilasølumaður. Ingálvur var yngstur. Allir sermerktir, vælhýrdir og við sera góðari sangrødd.

Elsa f. Thomsen og Ingálvur leitaði heim aftur á klettarnar eftir kríggið. Giftust og vunnu á øllum mótbrekkum, har onnur høvdu givust á hondum. Tey fingu átta børn, sum ymsu gávur teirra kennast aftur í.

### Ingálvur

At lýsa Ingálv sum persón ber bara ikki til. Eitt so lítillátið menniskja, sum var so undirdýktur í ymiskum gávum. Teknari og málari – altjóða list! sigur Wivel. Sangari – tann besti! meina mong. Framúr sunnudagsskúlalæraran, minnast mong afturá. Var trúfastur, altíð við tí góða orðinum, hevði stílsans og so mangt, mangt annað. Men at gerast heiðursborgari í høvuðsstaðnum? Nei, takk!!

Og hansara persónliga støðutakan til lívsins spurningar skerst tó ikki burtur. Til hugs rann tí meðan filmurin mól henda strofan (Gfs.582, C.O. Rosenius):

»Gangi eg um heiðar fjøll
og dalar,
fylgir vinur mær, eg hoyri hann;
tó ósjónligur hann til mín talar
troyst og revsing, sum mær tørva
kann - -«

Og sum dømi um hansara stílsans eitt ørindi, úr hesi einastu alment kendu týðing Ingálvs á bundnum máli (Gfs. 861):

»Drottur ævinleikans mikil,
hann sum skapti hinmafør,
einsamur á fold hann gekk,
so fremmandur á egnu jørð.
Saknur, sorg og pína nívdu
hjarta hans, og heimsins neyð
bar hann, og á krossi bøtti
vára synd við skemdardeyð.«

Hvussu mong hann ringdi til, skrivaði bræv ella kort til, táið nakað var at gleðast um, og ikki minni táið mótgongd ella sorg høvdu vitjað, tað ber bara ikki til at meta um.

Tað kom fyri, at onkur sum í andvekri, mót- og máttloysi á nátt ringdi til hann, og bað hann syngja onkran sang í telefonina, sær til ugga –. Og hann gjørdi tað!

Einaferð, fyrr ella seinni, fer hetta »ótrúliga« menniskja at fáa eitt savn ella minni, okkum øllum at gagni, sum hann hevur uppiborið.

*24.02.2010*



*Ingálvur av Reyni uttan fyri heim sítt á Lützenstrøð, tá hann fekk Mentanarvirðisløn Landsins í 2004*

*Mynd: Jens Kristian Vang*